HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Tíðindaskriv

**Færri nýggir tilburðir av H1N1**

Bert fimm nýggir tilburðir eru staðfestir seinastu tvær vikurnar. Tað vísir nýggjast uppgerðin frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Mælt verður tó framvegis til, at fólk eru ansin og fylgja teimum tilmælum, sum givin eru í sambandi við beinkrímið.

Talið á nýggjum staðfestum H1N1 tilburðum tykist vera minkandi. Seinastu tvær vikurnar hava 40 fólk latið seg kannað og fimm hava fingið staðfest H1N1-beinkrím. Hetta merkir tó neyvan, at sjúkan er við at hæsa av í hesum umfari og heilsumyndugleikar vænta, at ein nýggj bylgja av H1N1 tilburðum fer at taka seg upp á norðaru hálvkúlu, tá ið nakað er liðið út á heystið. Mælt verður tí til, at fólk framvegis eru ansin og fylgja teimum tilmælum, sum givin eru í sambandi við krímsjúkuna.

Tað týdningarmesta í sambandi við at fyribyrgja smittu er framvegis, at fólk vaska sær ofta um hendurnar, hosta ella njósa í ermuna og at verða heima, um ein er sjúkur.

Fólk í vandabólki og tey, ið gerast meira enn vanliga sjúk av influensa - eitt nú fáa trupulleikar við at anda - skulu vera serliga ansin. Vandabólkarnir eru: Tey, ið hava niðursett lungnavirkni, astma, hjartasjúku, sukursjúku, niðursetta immunverju, barnakonur frá 13. viku og fram (2. og 3. trimester), fólk við høgari yvirvekt (BMI meira enn 35) og børn undir 2 ár.

Fólk í vandabólki skulu seta seg í samband við egnan lækna ella læknavakt, um tey ella onkur av húskinum fáa influensa.

Víst verður annars til heimasíðuna hjá Heilsumálaráðnum, www.hmr.fo, ella Sundhedsstyrelsen, www.sst.dk, har fleiri upplýsingar eru at finna um H1N1.

Tórshavn, tann 22. september 2009

**Heilsumálaráðið og Landslæknin**

Hjálagt eru tvær talvur. Onnur vísir tal av kanningum og staðfestum tilburðum skift á vikur. Hin skift á dag seinasta mánaðin. Samanlagt hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan kannað 484 persónar og eru íalt 142 staðfestir tilburðir av Influensu A (H1N1).

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 354045 • E-mail: hmr@hmr.fo


14
12
10
8
6
4
2
0
31-08-2009
01-09-2009
02-09-2009
03-09-2009
04-09-2009
05-09-2009
06-09-2009
07-09-2009
08-09-2009
09-09-2009
10-09-2009
11-09-2009
12-09-2009
13-09-2009
14-09-2009
15-09-2009
16-09-2009
17-09-2009
18-09-2009
19-09-2009
20-09-2009
Tal av sýnum
H1N1 positiv


120
100
80
60
40
20
0
41
5
38
3
23
12
80
42
66
22
105
37
52
13
39
3
25
3
15
2
29
30
31
32
33
34
35
36
37
38
Vika
Prøver
H1N1 +